Petur Hermansen, píkaandstøðingur:

# AutoSock – ein góð loysn í kava



*Petur Hermansen í Havn hevur royndarkoyrt AutoSock á sínum BMW, sum einans hevur summardekk og verður drivin av bakhjólunum, við sera góðum úrsliti*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Kendi píkaandstøðingurin, Petur Hermansen í Havn, royndarkoyrir í løtuni eitt sett av AutoSock´s (kavasokkur) fyri fyritøkuna Sp/f AMA. Hetta er ein góð loysn, men bert í kava og ísi, sigur hann**

VETRARKOYRING

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Spurningurin um vertardekk ella píkadekk er ofta frammi, serliga tá vit síggja, hvussu illa vegirnir fara um veturin.

Ein sum hevur brúkt nógva tíð og orku upp á at upplýsa og argumentera ímóti píkadekkum er Petur Hermansen í Havn. Nú er hann biðin um at royndarkoyra eitt sett av AutoSock´s ella kavahosum fyri fyritøkuna Sp/f AMA, ið selur útgerð og eykalutir til bilar.

Petur hevur royndarkoyrt AutoSock á sínum BMW, sum einans hevur summardekk og verður drivin av bakhjólunum. Tað er eingin trupulleiki at koyra í hálum brekkum við nógvum kava, sigur hann.

AutoSock er eitt norskt produkt, sum er gjørt til at koyra við í kava og á ísi - ikki á asfalti og ikki koyra við hægri ferð enn 50 km/t. Endamálið við hesum kavasokkum er, at tað skal vera so lætt sum gjørligt at seta tær á bilin og at taka tær av, tá vegurin er táur aftur.

Kavasokkurin er gjørdur úr polyester og er sera lættur at smoyggja upp á dekkið, sigur Petur, sum sigur, at hann í eini sjónvarpssending í vikuni sá, at norski framleiðarin hevur fingið ein ordra upp í eina millión AutoSock´s, so talan er ivaleyst um eina ”succes”.

Lexus LS 460:

# Luksus Lexus við átta girum

**Meðan stóru Lexusbilarnir dominera á marknaðinum fyri luksusbilar í USA, halda evropearar enn fast við týskar luksusbilar sum Mercedes-Benz, BMW og Audi**



*Frá komandi ári skal Lexus LS 460 kappast við týsku luksusbilarnar á evropeiska marknaðinum*

Men nú bjóða Lexus evropearum av í luksusklassanum við nýggja Lexus LS 460. Bilurin var frumsýndur á stóru bilaframsýningini í Detroit herfyri.

Designið er meira sportsligt og linjurnar meira skarpar enn á forgangaranum, Lexus LS 430. Hesin nýggi hevur bæði átta sylindarar (V8) og átta gir. Talan er um heimsins fyrsta 8-trins automatgirkassa. V8 motorurin er upp á 4,6 litur við 380 hk og koyrir frá 0-100 km/t upp á 5,5 sekund. Momentið er upp á 500 Nm.

Eins og fleiri aðrir kendu luksusbilar verður Lexus LS 460 gjørdur í eini útgávu, ið er 12 cm longri enn tann vanligi, hetta fyri at geva betri beinpláss til tey á baksetrinum.

Tann bilurin er 503,0 cm langur, 188,0 cm breiður og 148,0 cm høgur.

Í kabinuni er alt luksus og leður við t.d. varma í rattinum, borð við baksetrini, fótskamlar, klimaanlegg við kropshitasensorum.

Lexus LS 460 kemur á amerikanska marknaðin í heyst og seinni til Evropa. Prísin kenn vit ikki, men í dag kostar forgangarin, Lexus LS 430, umleið hálva aðru millión krónur í Danmark.



Les Sosialin so ert tú við

· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

Sp/f Plátuverkstaðið
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo